Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Tordur Niclasen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Um landsstýrismaður situr fyri málsøkinum á fullgóðan hátt

Spurningar:

1. Heldur løgmaður, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum situr fyri sínum málsøki á fullgóðan hátt í samband við ætlaðu avtøkuna av aldursmarkinum ?
2. Um løgmaður ikki heldur, at landsstýrismaðurin situr fyri sínum málsøki á fullgóðan hátt, hvørji stig ætlar løgmaður tá at taka ?

Viðmerkingar:
Í samgonguskjalinum stendur soleiðis: "*Aldurin eigur ikki at vera avgerandi fyri, nær farið verður av arbeiðsmarknaðinum. Tænastumannalógin og aðrar forskriftir verða broyttar samsvarandi. Meginreglan er, at førleikin og ikki aldurin skal avgera, nær farið verður av arbeiðsmarknaðinum".*

Hóast hesa greiðu samgonguavtalu, hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum uppá fyrispurning (52-082/2021) frá undirritaða um avtøku av aldursmarkinum bert boðað frá, at *"Arbeitt verður í løtuni við at hækka fráfaringaraldurin úr 70 ár upp í 72 ár, bæði fyri sáttmálasett starvsfólk og fyri tænastumannasett."*

At hækka fráfaringaraldurin er ikki tað sama sum at avtaka hann, og hetta kann ikki annað enn tulkast sum, at tað í veruleikanum ongar ætlanir eru um at avtaka fráfaringaraldurin, soleiðis at pensjónistar sjálvir gera av, nær farið verður av arbeiðsmarknaðinum í mun til áhuga og førleika hjá tí einstaka.

At avtaka aldursmarkið er fult í samljóði við tað, ið Landsfelag Pensjónista hevur víst á og hevur havt ynski um at fáa broytt, soleiðis at vit fáa bannað hesum áralanga mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum.

Í Danmark varð hesin rætturin hjá pensjónistum tryggjaður við lóg fyri fleiri árum síðan.

Havandi eftirlitsskyldu løgmans í huga er tað, at spurningurin verður settur.

Á Løgtingi, 6. desember 2021

Tordur Niclasen